**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er millum 8.000 og 10.000 tekn og skrivað í essay stíli

**Næstu ferð:**
Nicolina Dahl,
Jólapynt flotar einki áttamannafar



# Neyð lærir nakna kvinnu at flyta



TÍÐARGREININ
*Magni Laksáfoss,*
*búskaparfrøðingur og løgtingsmaður*

## Beriførleikin í Føroyum má á dagsskrá

Seinastu mongu árini er føroyski beriførleikin støðugt viknaður. Hetta er ein vaksandi trupulleiki, ið millum annað ber í sær, at støðugt færri fólk kunnu liva og virka í Føroyum við verandi vinnubygnaði. Ein álvarslig avleiðing er, at serliga kvinnur í hópatal rýma av landinum. Beriførleikin eigur at gerast eitt avgerandi hugtak í føroyskum búskaparpolitikki frameftir. Høvuðsmálið má vera at økja beriførleikan í landinum. Eydnast tað ikki, fer fólkatalið í besta føri at standa í stað

Beriførleiki er eitt mát fyri, hvussu nógvum íbúgvum vinnubygnaðurin í einum øki er førur fyri at tryggja eitt sømiligt livistøði. Altumráðandi er at beriførleikin er vaksandi, um eitt land skal mennast og íbúgvarnir trívast.

Seinastu árini hevur føroyskur politikkur tó als ikki hugt eftir beriførleikanum. Í staðin hava nógvir av gomlu politikarunum havt fokus á at nøkta eina mangan misskilta tjóðskaparliga stoltleikakenslu. Úrslitini av hesum politikki fara nú at merkjast av álvara.

Enn er ikki ov seint at venda gongdini við at skifta fokus í politikkinum. Treytin er kortini, at stórar hugburðsbroytingar vinna frama í politiska umhvørvinum. Eingi útlit eru fyri, at CHE-samgongan ætlar sær at broyta kós. Hon heldur fram á leiðini, at tann misskilta stoltleikakenslan skal nøktast. Úrslitið er, at beriførleikin í føroyska búskapinum minkar.

**Hugtakið 'beriførleiki'**
Beriførleiki nevnist á enskum "carrying capacity", og hugtakið er lætt at skilja. Á síðu 94 í Gørtz-frágreiðingini frá 1994 er greitt soleiðis frá hugsanunum aftanfyri hugtakið:

"Historisk set har Færøerne været præget af en økonomi, hvor naturen satte skarpe grænser for, hvor mange mennesker (og dyr), der var plads til. Der var græsningsmuligheder for 70.000 får, og der var plads til, at nogle få tusinde mennesker kunne brødføde sig selv. […] Denne situation ændredes, da fiskeriet blev en stadig vigtigere næringsvej. Den er på sin vis genopstået, da fiskerigrænserne blev gennemført, og Færøerne fik sit eget, men begrænsede havområde at fiske i.

For væsentlige dele af den færøske befolknings erhvervsindkomstmuligheder er der en stærk begrænsning i, hvor mange der kan beskæftiges på områderne. Det gælder fiskeri i eget farvand, specielt efter de mere værdifulde fiskearter som torsk og kuller, samt fiskeopdræt, fåreavl mv.

Der er ikke tale om fuldstændig klare og skarpe kapacitetsgrænser. Men på de nævnte områder kan et begrænset antal personer opnå en ganske høj gennemsnitlig værdtitilvækst pr. person."

**Beriførleikin avgerandi ávirkan á fólkatalið**
Hetta brotið úr Gørtz-frágreiðingini vísir kjarnan í búskapinum: búskapurin setur eitt mark fyri, hvussu nógv kunnu »breyðføða« seg í landinum við verandi vinnubygnaði.

Legg til merkis eina ógvuliga týðandi niðurstøðu av øllum hesum: tað er ikki burðartíttleikin ella flytingarnar millum lond, sum í síðsta enda avgera fólkatalið í Føroyum. Nei, tað er vinnubygnaðurin og búskaparpolitikkurin. Flytingarnar til og úr Føroyum eru avleiðingar av førda bygnaðinum og politikkinum. Verður rætti politikkurin rikin, soleiðis at beriførleikin økist, er ein náttúrlig fylgja, at flytingin úr Føroyum aftur vendist til nettotilflyting.

Fremsta uppgávan hjá politikarum er tí at reka ein konstruktivan vinnu- og búskaparpolitikk, sum økir beriførleikan í búskapinum og gevur rúm fyri størri fólkatali og hægri livistøði.

**Beriførleikin kann mátast**
Við at nýta háttin hjá Pierre Verhulst frá 1838 ber til at máta beriførleikan.

Seinastu 200 árini er beriførleikin øktur í fleiri umførum frá umleið 5.500 fólk í 1813 til uml. 60.000 fólk eftir seinna veraldarbardaga. Hetta merkir ikki, at fólkatalið í Føroyum nakrantíð hevur verið 60.000, men at potentialið í samfelagnum hevur ligið um 60.000 fólk.

Tá fiskimarkið fór út á 200 fjórðingar síðst í 70'unum minkaði beriførleikin úr 60.000 niður í 55.000. Tað er nokk rættari at siga, at fiskimarkið varð flutt inn á 200 fjórðingar, við tað, at føroyingar áður fiskaðu á verðinshøvunum men nú eru noyddir at fiska á einum avmarkaðum fiskiøki við Føroyar.

Tá Ríkisvetigin minkaði í 2002 viknaði beriføreikin aftur, hesuferð niður á umleið 52.000. Tvs. at vit í dag liggja heilt tætt upp at beriførleikanum. Um vit ikki økja um beriførleikan í komandi árum, vil fólkatalið í Føroyum tískil ikki økjast stórvegis, men heldur standa í stað.



*Savnsmynd frá ólavsøkuframsýningini, Slóarblóð, í 2007. Málningur hjá Erlu Maritu Askham*

Harumframt er líkt til, at beriførleikin fer at vikna upp aftur meira í komandi árum, um samgongan fremur ætlarnirnar um aftur at skerja Ríkisveitingina og fremja yvirtøkur uttan at seta nakað annað í staðin.

**Beriførleikin skal styrkjast**
Málið fyri búskaparpolitikkinum frameftir má vera at økja og styrkja beriførleikan – ikki at minka um hann.

Fyri at økja beriførleikan má ein miðvísur politikkur rekast, ið hevur til endamáls at menna vinnuligu karmarnar og gagnnýta møguleikarnar í føroyska samfelagnum og altjóða búskapinum.

Ein upplagdur máti er at tryggja føroyska vinnulívinum best møguligar marknaðar- og menningartreytir við at fáa limaskap í Europasamveldinum við neyðugum undantøkum á fiskivinnuøkinum. Hetta er ein upplagdur háttur at kunna gagnnýta møguleikarnar í føroyska búskapinum betri.

Í dag eru nógvir vansar av treytum og reglugerðum, ið ES setir okkum, men vit fáa stórt sæð ongar av fyrimununum, ES hevur at bjóða. Einans við fullum limaskap í ES kunnu vit fáa allar fyrimunirnar.

Tí er tað at frøðast yvir, at fólkatingsmaðurin Edmund Joensen hevur sett hol á eina tilgongd, har vit fáa innlit í verulig fakta um treytir fyri møguligum ES-limaskapi!

**Fíggjargeirin kann økja beriførleikan**
Ein vinnugrein, ið longu sær út til at kunna vera við til at økja um beriførleikan í føroyska samfelagnum, er fíggjargeirin. Føroysku bankarnir eru nú vaksnir út um landoddarnar og eru við til at leggja lunnar undir øktan beriførleika.

Treytin er tó, at fíggjargeirin hevur trygg og skipað viðurskifti at arbeiða undir.

Ein ætlan hjá hesi samgonguni er at yvirtaka fíggjareftirlitið og skipa eitt føroyskt fíggjareftirlit. Hetta er at spæla hasard við eini skipan, sum í dag virkar, sum hon skal. Um álitið á føroyska fíggjareftirlitið ikki verður nøktandi eftir yvirtøkuna, merkir tað, at føroyski fíggjargeirin skal gjalda eina eyka risikopremiu sammett við bankar undir donskum fíggjareftirlitið og ES-reglum.

Avleiðingin er verri kappingarføri í føroyska fíggjargeiranum, sum jú virkar undir altjóða kappingartreytum, har altjóða kappingarførið er altavgerandi fyri, um bankarnir mennast ella um teir søkka afturút í kappingini.

Eingin fyrimunur er við at yvirtaka fíggjareftirlitið. Bert tann misskilti nationali stoltleikin, har alt tað, sum kann yvirtakast, skal yvirtakast, óansæð um hetta er til vansa fyri fólkið og vinnuna í landinum. Ein yvirtøka av fíggjareftirlitinum kann einans minka um møguleikarnar hjá fíggjargeiranum. Ongar dyr verða latnar upp við hesari yvirtøkuni, og tí eigur hon ikki at verða framd.

Í staðin fyri at yvirtaka fíggjareftirlitið, áttu vit heldur at bundið tað enn tættari at ES-reglunum við at fari inn í ES. Hetta hevði verið til fyrimuns fyri føroyska fíggjargeiran.

**Ríkisveitingin og beriførleikin**
Sum nevnt omanfyri vil ein minking í Ríkisveitingini minka um beriførleikan. Mytan um, at »neyð lærir nakna kvinnu at spinna«, er beinleiðis skaðilig, tí hon letur upp fyri eini hugsjón um, at bara vit trýsta okkara samfelag nóg langt niður, vilja koma loysnir og framburður av sær sjálvum.

Í veruleikanum átti orðatakið nokk heldur verið: »Neyð lærir nakna kvinnu at flyta!«, tí ein náttúrlig avleiðing av at minka beriførleikan er, at fólk flyta av landinum – serliga eru tað kvinnurnar, ið flyta.

Hetta kann ljóða sum, at man ikki vil arbeiða fyri einum sjálvberandi búskap. Tað er tó ikki rætt. Vit eiga heldur at **VAKSA** okkum til ein sjálvberandi búskap við at skapa røttu vinnuligu og búskaparligu karmarnar heldur enn at **MINKA** okkum til ein sjálvberandi búskap við einsíðugt at fokusera uppá at minka Ríkisveitingina, steingja dyr og minka um vakstrarmøguleikarnar hjá vinnuni.

Lat okkum tí fáa fokus á at styrkja og økja beriførleikan í føroyska búskapinum. Tá fáa vit grundarlag fyri menning, økta vælferð og framburð.

Tíðargreinin